Mál- og avrikssáttmáli millum

# Heilsutrygd og Heilsumálaráðið

1. januar – 31. desember 2011



HEILSUMÁLARÁÐIÐ & heilsutrygd

# Innihaldsyvirlit


Visión: ... 3

Missión: ... 3

Fyri at røkka visiónini skal Heilsutrygd: ... 4

Inngangur: ... 4

Aðalendamálið hjá Heilsutrygd er: ... 5

Endamálið er: ... 5

Fíggjarviðurskifti: ... 6

Starvsfólkaviðurskifti: ... 7

Arbeiðsøki og kjarnuøkir: ... 8

Heilsutrygd hevur tvey kjarnuøkir: ... 8

Kjarnuøki 1 umfatar: ... 8

Kjarnuøki 2 umfatar: ... 8

Onnur týdningarmikil økir: ... 9

Samstørv: ... 9

Framhaldandi virksemi hjá Heilsutrygd ... 10

At menna Heilsutrygd sum sjálvstøðugan stovn ... 10

KT-skipan ... 10

Starvsfólkamenning ... 11

Verkætlan í 2011 ... 12

Heilsutrygdarprógv ... 12

Heimasíða ... 12

Talva yvir virksemi hjá Heilsutrygd í 2011 ... 13

Talva yvir virksemi hjá Heilsutrygd í 2010 ... 16

## Visión:

Heilsutrygd er almenn heilsutrygdarskipan, sum skal tryggja øllum borgarum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.

## Missión:

Heilsutrygd skal veita øllum borgarum landsins góðar heilsufrøðiligar tænastur.

Heilsutrygd:

- rindar fyri viðgerð hjá kommunulækna
- veitir ískoyti til keyp av tilskotsheimilaðum heilivági
- veitir stuðul til uppihald á eftirbataheimi
- endurrindar gjald til ferðing til og frá lækna og jarðamóðir
- rindar gravarhjálp
- rindar ískoyti til brillur
- rindar ískoyti til viðgerð hjá:
  - tannlækna
  - kiropraktori
  - statsautoriseraðum tannrøktara
- rindar ískoyti til ávís hjálparráð, sum er liður í viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði
- rindar tilskot til kostískoyti, merkivørur o.a., sum lækni hevur ávíst í smb. við viðgerð av sjúku ella álvarsliga viknaðum persónum

Við ávísing frá lækna, verður ískoyti veitt til gjald fyri viðgerð hjá:

- serlækna
- fysioterapeuti
- ergoterapeuti
- sálarfrøðingi
- statsautoriseraðum fótterapeuti

Heilsutrygd raðfestir sera høgt at avgreiða øll mál og rokningar so skjótt sum gjørligt. Avgreiðslutíðin skal fyri allar vanligar avgreiðslur í mesta lagi vera ein vika.

Heilsutrygd vil eisini veita landsmyndugleikum, stovnum og øðrum fakfólkum ráðgeving og viðkomandi upplýsingar – tó uttan at fara útum lógarinnar heimildir við viðkvæmum upplýsingum.

Heilsutrygd skal miðvíst arbeiða fram ímóti at betra tænastustøði, hækka fakliga støði við m.a. at hava starvsfólk við røttum royndum og útbúgvingum og skipað fyri viðkomandi skeiðum og eftirútbúgvingum.

### Fyri at røkka visiónini skal Heilsutrygd:

- vera ein tænastusinnaður stovnur
- menna skipanir til skrásetingar og hagtøl
- menna samstarvið við aðrar myndugleikar og stovnar
- vera ein brúkaravinarligur stovnur
- vera eitt gott og stimbrandi familjuvinarligt arbeiðspláss, har starvsfólk trívast
- hava starvsfólk á høgum fakligum ástøði, umframt at skipa fyri støðugari førleikamenning

## Inngangur:

Heilsutrygd varð sett á stovn hin 1. Januar 2010. Heimildin er í løgtingslóg nr. 178 frá 22. Desember 2009. Heilsutrygd er skipað sum sjálvstøðugur stovnur undir Heilsumálaráðnum.

Heilsutrygd er almenn heilsutrygdarskipan, sum skal tryggja øllum borgarum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.

Stovnurin avloysir teir ellivu sjúkrakassarnar, sum áður vóru runt landið.

Stovnurin hevur ymiskar álagdar uppgávur smb. løgtingslóg um almenna heilsutrygd. Stovnurin hevur eisini yvirtikið teir sáttmálar og tær avtalur, sum áður vóru við Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, MSF.

Nýggir sáttmálar skulu gerast, og fleiri av verandi sáttmálum skulu endurnýggjast.

Virksemið hjá stovninum er nýtt og lógin er nýggj. Tí verður neyðugt við tillagingum, fyri at fáa stovnin at virka enn betur, og fyri at betra tænastuna til borgaran.



### Aðalendamálið hjá Heilsutrygd er:

- at tryggja øllum borgarum landsins eina skjóta og góða tænastu innan øll tey økir, sum eru áløgd stovninum
- at veita øllum samstarvsfeløgum eina skjóta og góða tænastu, har avgreiðslutíðin er so stutt sum gjørligt – í mesta lagi fimm yrkadagar fyri allar vanligar avgreiðslur
- menna eina talgilda skipan, sum ger tað møguligt eftir stuttari tíð at veita landsmyndugleikum, øðrum stovnum og ráðum ráðgeving og vegleiðing
- at vera ein brúkaravinarligur stovnur, har borgarin eisini fær møguleika til at avgreiða fleiri av sínum viðurskiftum skjótt og ómakaleyst umvegis heimasíðu stovnsins

### Endamálið er:

- at rinda ískoyti til heilivág
- at rinda fyri viðgerðir, ávíkavist fult út ella partvíst
- eftir umsókn og læknaváttan at veita stuðul til hjálparráð





## Fíggjarviðurskifti:

Smb. § 24 í lógini um almenna heilsutrygd verður Heilsutrygd fyri árini 2010 og 2011 fíggjað við at allir borgarar, sum eru yvir 18 ár og skrásettir í fólkayvirlitinum rinda kr. 245 um mánaðin. Tó eru fólk við niðursettari pensión frítikin fyri at gjalda. TAKS krevur hesar pengar inn.

Frá 1. januar 2012 er ætlanin, at Heilsutrygd skal fíggjast yvir skattin.

Samlaða játtanin til Heilsutrygd fyri 2011 er 150.796 tkr. Játtanin er í tveimum: 8.500 tkr. til vanligan rakstur og 142.296 tkr. til veitingar.

Mánaðardeild fíggjarætlan verður løgd við ársbyrjan, so lættari er at samanbera nýtslu og játtan. Hetta fyri neyvari at tryggja at játtanin heldur.

Við støði í játtanini verður ein ætlan løgd fyri, hvat verður raðfest í árinum.

Telduskipanin skal mennast enn meir, umframt at allir borgarar í 2011 skulu hava eitt heilsutrygdarprógv. Funkurnar á kortinum skulu mennast. Henda menning kemur at taka nøkur ár, alt eftir hvussu stór fíggjarorkan verður.



## Starvsfólkaviðurskifti:

Áðrenn Heilsutrygd varð sett á stovn, varð mett, at 8-10 starvsfólk skuldu mannað stovnin. Harafturat varð mett, at 1-2 starvsfólk skulu taka sær av málsviðgerð av hjálparráðum.

Starvsfólkatalið er 9 fólk í fulltíðarstarvi, umframt at eitt hjálparfólk nakrar ferðir hevur verið í starvi.

Hesi 9 starvsfólkini eru: 4 avgreiðslufólk til tað virksemi, sum sjúkrakassarnir primert avgreiddu áður (herav er ein skrivstovunæmingur). 1 starvsfólk til málsviðgerð av hjálparráðum, 1 fíggjar- og fyrisitingarleiðari, 1 leiðslufulltrúi, 1 KT-mennari og stjóri. Nakrar tímar um vikuna vaskar vaskikonan, sum eisini vaskar fyri Nema.

2 av avgreiðslufólkunum eru tey, sum starvaðust fyri Norðoya Sjúkrakassa, umframt at 1 starvsfólk áður starvaðist fyri Fuglafjarðar Sjúkrakassa. Hesi starvsfólk hava millum 20 og 35 ára royndir.

Ein setanarbólkur varð settur, og lýst varð eftir hinum starvsfólkunum. Hesi byrjaðu í størvunum frá juni – august 2010.



## Arbeiðsøki og kjarnuøkir:

Allir borgarar, sum eru skrásettir í føroyska fólkayvirlitinum, eru umfataðir av Heilsutrygd, so tí kann sigast, at arbeiðsøkið er kring alt landið. Skrivstovan er í Klaksvík.

### Heilsutrygd hevur tvey kjarnuøkir:

1. At umsita og avgreiða tann partin, sum sjúkrakassarnir áður gjørdu. Herundir eisini at veita upplýsingar o.a. til ráð og stovnar.
2. At umsita og viðgerða umsóknir um hjálparráð.

**Kjarnuøki 1 umfatar:**
**Tænastur til allar føroyingar:**

- rinda fyri viðgerð hjá kommunulækna
- veita ískoyti til keyp av tilskotsheimilaðum heilivági
- veita stuðul til uppihald á eftirbataheimi
- endurrinda gjald til ferðing til og frá lækna og jarðamóðir
- rinda gravarhjálp
- rinda ískoyti til brillur
- rinda ískoyti til viðgerð hjá:
    - tannlækna
    - kiropraktori
    - statsautoriseraðum tannrøktara

Við ávísing frá lækna, verður ískoyti veitt til gjald fyri viðgerð hjá:

- serlækna
- fysioterapeuti
- ergoterapeuti
- sálarfrøðingi
- statsautoriseraðum fótterapeuti

**Kjarnuøki 2 umfatar:**

- rinda ískoyti til ávís hjálparráð, sum er liður í viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði
- rinda tilskot til kostískoyti, merkivørur o.a., sum lækni hevur ávíst í smb. við viðgerð av sjúku ella álvarsliga viknaðum persónum

**Onnur týdningarmikil økir:**

- útvega øllum føroyingum Heilsutrygdarprógv í 2011, og menna skipanir so full nytta fæst úr kortinum. Hugsað verður her um skipanir hjá kommunulæknum, apotekum, tannlæknum, fysioterapeutum o.ø. samstarvspartnarum
- lyfta stovnin á eitt hægri støði hvat skipanum, hagtølum o.ø. viðvíkur
- gera avtalu um endalig hølir, útvega neyðuga útgerð og flyta í hølini

**Samstørv:**

Heilsutrygd samstarvar við fleiri ymiskar stovnar, viðgerðarstovur og fyritøkur umframt Heilsumálaráðið. Nevnast kunnu:

- Apoteksverk Føroya
- Sjúkrahúsverk Føroya
- Kommunulæknafelag Føroya
- Føroya Tannlæknafelag
- Fysioterapifelag Føroya
- Ergoterapeutfelag Føroya
- Føroyskir Sálarfrøðingar
- Serlæknafelag Føroya
- Almannastovuna
- Hvíldarheimið Naina
- Kiropraktorar
- Fótarøktarar
- Privatir borgarar
- o.o.



## Framhaldandi virksemi hjá Heilsutrygd

### At menna Heilsutrygd sum sjálvstøðugan stovn

Heilsutrygd setir sera frammalaga at menna stovnin til ein vælvirkandi, sjálvstøðugan og brúkaravinarligan stovn. Virksemi er grundað á løgtingslóg nr. 178 frá 22. Desember 2009 um almenna heilsutrygd.

Fleiri av avgreiðsluháttunum og sáttmálunum hevur Heilsutrygd arvað frá gomlu sjúkrakassaskipanini. Neyðugt er við tillagingum og nýggjum sáttmálum á ymsum økjum.

### KT-skipan

- Heilsutrygd koyrir á Landsnet, og øll bókhaldsskjøl verða skrásett á Búskaparskipan Landsins. Bókhaldsskjøl, sum ikki koma inn elektroniskt, verða antin send Gjaldstovuni til innskanningar ella skannað og goymd á Heilsutrygd
- Sjúkrakassarnir nýttu skipanina Navision bæði sum bókhaldsskipan og til skráseting av borgarum og læknum. Navision skipanin er útbygd og allir persónsupplýsingar fyri allar sjúkrakassarnar eru lisnir inn í hesa skipan. Kostnaðurin hevur higartil verið uml. 250 tkr.
- Heilsutrygd avgjørdi at keypa Info Organizer til journalskipan. Nakrar tillagingar skuldu gerast, fyri at fáa meir nyttu úr skipanini. Samlaður kostnaður liggur um 100 tkr.
- ynskiligt hevði avgjørt verið, at samankoyrt flestu skipanir í eina skipan. Eina skipan, sum eisini er meira brúkaravinarlig. Eina skipan, har borgarin kann avgreiða fleiri av sínum viðurskiftum umvegis heimasíðu stovnsins
- í 2011 er málið at menna skipan soleiðis at telduskipanin hjá kommunulæknunum, Cosmic, tøkniliga kann samstarva við nýggja heilsutrygdarprógvið. Kostnaðin kenna vit ikki
- í hesum sambandi verður arbeitt við at Heilsutrygd kann yvirtaka umsitingina av profylaksum
- framhaldandi menna skipan rundanum heilsutrygdarprógvi, alt eftir fíggjarligu orkuni
- av tí at Heilsutrygd er nýggjur stovnur, eru nógvar mannagongdir, sum skulu gerast, m.a. mannagongdir innan KT og nýtslu av teldum og skipanum. Málið í 2011 er at gera mannagongd fyri m.a. nýtslu og handfaring av arbeiðsteldu, arbeiðstelduposti og arbeiðstelefon

### Starvsfólkamenning

- Heilsutrygd raðfestir starvsfólkamenning og starvsfólkarøkt sera frammaliga, tí vit meta hetta sum eina avgjørda fyritreyt fyri trivnaði og jaligari menning
- Heilsutrygd hevur gjørt av at seta í verk eina skipan við trivnaðar- og starvsfólkamenning
- málið er, at øll starvsfólk hava verið til eina trivnaðar- og starvsfólkasamrøðu innan árslok 2011
- málið er eisini, at hava árligar trivnaðar- og starvsfólkasamrøður
- Heilsutrygd vil virka fyri at veita øllum starvsfólkum góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning og skeiðum, sum styrkja um førleikan
- Heilsutrygd skipar fyri temadøgum og upplæring. Harumframt verða starvsfólk eggjað til at luttaka á viðkomandi skeiðum og temadøgum, tá tað ber til
- Heilsutrygd leggur dent á at menna ávísar starvsførleikar, fyri at kunna veita brúkarum betri tænastu á ymsum økjum
- Heilsutrygd ger mannagongdir á flest øllum økjum. Hesar verða lagdar á felags drev, og er at meta sum starvsfólkahandbók hjá øllum starvsfólkum



# Verkætlan í 2011

## Heilsutrygdarprógv

Lógin um almenna heilsutrygd ásetur, at allir borgarar í Føroyum, skulu hava eitt heilsutrygdarprógv í 2011.

Málið er at uppfylla hetta kravið í lógini, umframt at heilsutrygdarprógvið skal stuðla undir at talgilda avrokningarnar av heilsutrygdarveitingunum. Í fyrstu atløgu er ætlanin, at kortið skal kunna brúkast úti hjá kommunulæknum. Kortið er bílagt, men enn eru nøkur viðurskifti so sum útsjónd ikki komin endaliga uppá pláss. Hesi verða væntandi uppá pláss í fyrsta ársfjórðingi í 2011.

Fyri at kortið skal kunna brúkast í viðtalunum hjá kommunulæknunum, skal ein kortlesari setast upp, umframt at telduskipanin Cosmic, sum kommunulæknarnir brúka, skal tillagast. THS hevur samskift nakað við Logica, sum er veitari av Cosmic. Í fyrstu syftu vóru upplýsingarnir, at tað ikki er gjørligt at fáa Cosmic at samstarva við kortið. THS ger tó enn eina roynd, at fáa hetta í rættlag. Kostnaðin kenna vit ikki, men royndirnar vísa, at broytingar í Cosmic skjótt leypa upp í nakrar 100 tkr.

Veitarin av kortinum kann pakka upp til 4 kort í sama brævbjálva. Hetta hevði spart nógvar pengar í útbering, helst umleið 100-200 tkr. Vit hava spurt okkum fyri hjá Dátueftirlitinum, sum mælir okkum frá at gera brúk av hesum møguleika. Orsøkin er heilt einfalt tann, at skrásetingarnar hjá fólkayvirlitinum ikki eru góðar nokk.

Gerast skal eisini ein avtala um 24 tíma telefontænastu, sum víst verður til á baksíðuni á kortinum. Vit eru í løtuni í samráðingum við eina fyritøku um hetta.

Framleiðsla og útbering av kortinum kostar umleið 600 tkr.

Afturat hesum koma so kortlesarar umframt tillagingar í skipanum, sum vit ikki kenna kostnaðin av. Nakað av hesum kostnaði verður sendur víðari til kommunulæknaviðtalurnar – harvið kommunurnar.

Næsta stig verður at fáa skipanirnar hjá apotekunum at koyra saman við kortunum. Tað verður vónandi í 2012.

Síðan er ynskiligt at fara víðari, og knýta m.a. tannlæknar, fysioterapeutar o.o. afturat.

Hvussu langt vit røkka og hvussu skjótt veldst um fíggjarligu orkuna.

## Heimasíða

Heimasíðan verður væntandi løgd út í apríl 2011. Kostnaður um 80.000 kr. Ætlanin er at menna heimasíðuna til at vera eina meria brúkara vinarliga heimasíðu, har borgarin kann avgreiða fleiri av sínum viðurskiftum/umsóknum sjálvur. Hetta krevur broytingar, skipanir og tillagingar, sum vit ikki kenna kostnaðin av.

## Talva yvir virksemi hjá Heilsutrygd í 2011

| Endamál | Støða | Mál í 2011 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Menna Heilsutrygd til ein vælvirkandi sjálvstøðugan stovn | Stovnurin avgreiðir síni viðurskifti, men enn væntar at menna ymiskar sjálvstøðugar skipanir og funktiónir | Gera nýggjar mannagongdir | Heilsutrygd koyrir á Landsnet<br><br>Reglur gjørdar fyri postmóttøku, skjalagongd og uppgávubýti | Innliman: Útreiðsluneu-tralt. Árligt gjald: 750 kr. pr. teldu pr. mőr<br><br>Ikki viðført nakran eykakostnað |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Heilsutrygdarprógv | Lógin um almenna heilsutrygd ásetur, at allir borgarar í Føroyum skulu hava eitt heilsutrygdarprógv í 2011 | Allir føroyingar fáa Heilsutrygdarprógv<br><br>Menna skipan so kortið kann samstarva við kommunulæknaskipanina Cosmic | Kortið er bílagt fyri jól, og verður borið út í 2011<br><br>Samskiftið er í gongd við veitarar | Samlaður kostnaður fyri framleiðslu og útbering er uml. 600.000 kr. 200.000 blivu fakturerаðar í 2010. Uml. 735.000 settar av í 2011<br><br>Kenna ikki kostnaðin |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Kommunulæknaskipan | Skipan, sum Formula hevur ment, er gjørd í Navision | Menna skipanina enn meir, so hon gerst lættari og betri at brúka | Gera dagføringar og smærri broytingar | Umleið 50 tkr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>HR – menning<br><br>Heilsutrygd ynskir at vera eitt familjuvinarligt, jaligt og mennandi arbeiðspláss í samsvar við galdandi almennan starvsfólkapolitikk | Heilsutrygd raðfestir starvsfólkarøkt- og menning frammaliga | At øll starvsfólk eru til árligar menningar- og starvsfólkasamrøðu<br><br>Starvsfólkahandbók verður gjørd, og verður løgd á felagsdrevið | Skipa samrøðurnar í apríl<br><br>Gera starvsfólkahand-bøkur | 20.000 kr.<br><br>Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Roknskaparreglugerð<br>Gera roknskaparreglu-gerð fyri Heilsutrygd og fáa hana góðkenda av Heilsumálaráðnum | Roknskaparreglugerðin er gjørd, og er send Heilsumálaráðnum til góðkenningar.<br>Nakað av samskiftið hevur verið, og smærri broytingar eru gjørdar.<br>Heilsutrygd hevur skrivað undir.<br>Reglugerðin er góðkend og undirskrivað av HMR 23.02.2011 | At Heilsutrygd skal hava eina dagførda roknskaparreglugerð, sum greitt lýsir øll viðurskifti um roknskaparhald hjá Heilsutrygd.<br><br>At øll starvsfólk skulu til allar tíðir vera væl kunnað um innihaldi í roknskaparreglugerðini<br><br>At roknskaparreglugerð-in er dagførd | Roknskaparreglugerðin er undirskrivað, og send Heilsumálaráðnum til undirskrivingar.<br>Miðjað varð eftir, at hon bleiv góðkend seinast í 2010, men tað bleiv hon ikki. Nú vóna vit at hon verður góðkend í februar<br><br>Roknskaparreglugerðin verður løgd fram og gjøgnumgingin saman við starvsfólkunum í mars<br><br>Reglugerðin verður dagførd samsvarandi broytingum á stovninum, umframt virkisøki og yvirskipaðu fyrisetingunum annars | Útreiðsluneutralt<br><br>Útreiðsluneutralt<br><br>Útreiðsluneutralt |

| **Endamál** | Støða | Mál í 2011 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Finna egnaði hølir til virksemi, fyrst fyribils hølir og síðan hølir til langtíðar nýtslu | Lýst varð eftir hølum til varandi loysn.<br>22 bjóðaðu hølir fram | Finna endaligu hølini, og gera sáttmála um leigu | Uppskot til sáttmála sent Landsverk til góðkenningar. Eftir ætlan flyta í nýggju hølini í juni 2011 | Leigan verður uml. 26.000 pr. mðr + el og olju |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Stovnurin er nýggjur, og skal hava neyðugt innbúgv | Fyribilshølini vit eru í vóru møblerað, tá vit fluttu inn | Keypa neyðugt innbúgv og neyðuga útgerð | Útvega tilboð og keypa tað, sum neyðugt er | Umleið 300-400 tkr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Heimasíða | Heimasíðan verður løgd út í apríl. Heimasíðan skal vera upplýsandi og tað skal m.a. bera til útskriva oyðubløð | Menna heimasíðuna enn meir, so hon verður meir brúkaravinarlig. Tað skal eisini bera brúkaranum til at avgreiða nøkur av sínum viðurskiftum umvegis heimasíðuna | Gera kravfestingar, og fremja nøkur av málunum í verki | Umleið 80.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>KT trygd | Mannagongdir og skipanir skulu gerast fyri at betra um KT trygdina | Arbeiðað meir miðvíst við at hækka KT-trygdina og at gera mannagongdir. Gjaldstovan og Landsnet hava bjóðað seg fram at hjálpa okkum við hesum<br><br>Gera mannagongd fyri nýtslu og handfaring av arbeiðsteldu, arbeiðs-telduposti og arbeiðs-telefon | Gera avtalu við Apotekið um stýring av heilivágs-tilskotskipanini.<br><br>Gera kt-trygdarpolitik<br><br>Gjørt í 1. ársfjórðingi og lagt á felgsdrev á Landsnet | Kenna ikki kostnaðin<br><br>Kenna ikki kostnaðin<br><br>Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Standardisera mannagongdir | Stovnurin er enn nýggjur. Nakrar mannagongdir eru gjørdar. | Gera mannagongdir á flestu økjum. Hesar skulu standardiserast. | Skipa hesar mannagong-dir og leggja tær á okkara felags drev á Landsnet | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Endurnýggja sáttmálar við fakfeløg og samráðast um nýggjar sáttmálar við fakfeløg | Heilsutrygd hevur yvirtikið teir sáttmálar við fakfeløg, sum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya hevði. Harafturat skulu sáttmálar gerast við fakfeløg, har ongin sáttmáli var áður | Fáa gongd á samráðingar við nøkur av fakfeløgunum.<br><br>Samráðingarnar ganga umvegis Samráðingar-nevndina, har Heilsutrygd hevur umboð | Samráðingar eru byrjaðar við nøkur av fakfeløgunum | Kenna ikki kostnaðin |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Kommunulæknar senda rokningar úr Cosmic | Í dag senda flestu kommunulæknar manuellar rokningar, har teir leggja við tær smáu rokningarnar, har kundin hevur skrivað undir | Fyrireika Cosmic og kommunulæknarnar at brúka samlirokning úr Cosmic | Nakrir læknar eru byrjaðir at brúka skipanina, men har eru trupuleikar við Cosmic, sum mugu loysast fyrst. Síðan mugu kommunulæknarnir hava neyva upplæring | Kenna ikki kostnaðin |

| **Endamál** | Støða | Mál í 2011 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Kjarnuøki 1:<br><br>Avgreiðslur, sum áður hoyrdu undir gomlu sjúkrakassaskipanina | Avgreiðslurnar ganga í dag væl, men onki er so gott, at tað ikki kann gerast betur. | Gera smidligari mannagongdir, og arbeiða fram í móti meir talgilding av skipanum. M.a. fáa allar kommunulæknar at senda rokningar úr Cosmic | Fáa kommunulækna-viðtalurnar við í skipanina við Heilsutrygdarprógvi. Fer at lætta munandi um arbeiðsbyrðuna, umframt minni møguleikar fyri feilum | Kenna ikki kostnaðin |
| Kjarnuøki 1:<br><br>Avrokning við Apotekini | Rokningarnar frá Apotekunum eru frá tí at Heilsutrygd byrjaði, komnar so mikið seint, at Búskaparskipanin hevur stongt fyri bókingum fyri seinasta mánaðin. Broytingar eru gjørdar hjá apotekunum, soleiðis at vit nakrar mðr. í 2010 fingu rokningarnar so tíðliga, at til bar at bóka í røttum mðr. | Framhaldandi bera so í bandi, at fakturar frá Apotekunum koma rættstundis, so teir blíva bókaðir í røttum mðr. | Í samstarvið við Apotekini arbeiða fyri, at fakturarnir kunnu bókast í røttum mðr. | Útreiðsluneutralt |
| Kjarnuøki 1:<br><br>Avrokning við læknar | Rokningar frá læknum eru tíðandi partar av okkara útreiðslur. Fyri at fáa hesar bókaðar í røttum mðr., er neyðugt at læknar senda rokning vikuliga | Fáa allar læknar at senda vikuligar rokningar – bæði teir sum í dag senda vikuliga, men eisini teir, sum enn ikki gera tað | Boð blivu send til allar læknar á sumri 2010. Flestu teirra senda vikuliga, men miðjast skal ímóti, at allir senda vikuligar rokningar | Kostnaðarneutralt |
| Kjarnuøki 2:<br><br>Avgreiðsla av hjálparráðum | Bíða ov nógv eftir skjølum frá Almannastovuni. Tað viðførir ov langa avgreiðslutíð. | Gerast minni heft av upplýsingum og skjølum frá Almannastovuni. Tørvurin hjá okkum á hjálp og skjølum frá Almannastovuni minkar, sum tíðin líður | Høvdu skrivliga avtalu um samstarv við Almu, sum gekk út 31.12.2010. Framlongja avtaluna til 30.06.2011, tá mett verður, at vit ikki hava tørv á avtalu longur | Útreiðsluneutralt |
| Kjarnuøki 2:<br><br>Avtala um ríðufysioterapi | Síðan 01.08.2010 hevur ongin skipan verið fyri fjølbrekað børn, sum áður hava fingið stuðul til ríðifysioterapi | Gera nýggja avtalu | Fróði Jacobsen er vegna bólkin komin væl áleiðis við uppskoti til avtalu | Kenna ikki veruliga kostnaðin |
| Kjarnuøki 2:<br><br>Fysioterapi | Sáttmálin ásetur, at fysioterapiviðgerð ikki skal byrja, fyrr enn læknaváttan fyriliggur. Sáttmálin ásetur eisini, at borgarin skal vátta fyri viðgerðinar. Hetta hevur ikki verið siðvenja | Stramma meir upp, so allar greinar í sáttmálanum verða hildnar | Ikki rinda fyri fysioterapi-viðgerð, har hesi viðurskifti ikki eru í lagi | Útreiðsluneutralt – kanska ein sparing fyri Heilsutrygd |

Heilsutrygd er nýggjur stovnur, sum byrjaði sítt virksemi 1. Januar 2010. Í 2010 eru tí fleiri mál sum eru avgreidd. Í 2010 gjørdu Heilsutrygd og Heilsumálaráðið ongan mál- og avrikssáttmála, so tí er er ein talva yvir virksemi í 2010:

## Talva yvir virksemi hjá Heilsutrygd í 2010

| Endamál | Støða | Mál í 2010 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Menna Heilsutrygd til ein vælvirkandi sjálvstøðugan stovn | Stovnurin avgreiðir síni viðurskifti, men enn væntar at menna ymiskar sjálvstøðugar skipanir og funktiónir | Velja og útvega journalskipan<br><br>Gera nýggjar mannagongdir<br><br>Byrja uppá arbeiðið at útvega øllum føroyingum Heilsutrygdarkort | Heilsutrygd koyrir á Landsnet<br><br>Hava útvega Info Organizer.<br><br>Reglur gjørdar fyri postmóttøku, skjalagongd og uppgávubýti<br><br>HMR hevur sett arbeiðsbólk. Kortið er bílagt fyri jól | Innliman: Útreiðsluneu-tralt. Árligt gjald: 750 kr. pr. teldu pr. mðr<br><br>Umleið 100.000<br><br>Ikki viðført nakran eykakostnað<br><br>200.000 blivu faktureraðar við ordra |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Samankoyra data frá øllum sjúkrakøssunum yvir í felags telduskipan Skipanin verður ment til eina kommunulækna-skipan, sum skrásetur, hvønn kommunulækna hvør einstakur borgari hevur.<br>Skipanin skal eisini brúkast til avrokning av samsýning hjá kommunulæknum | Skipan, sum Formula hevur ment, er gjørd í Navision.<br>Upplýsingar eru lisnir yvir í skipanina, og skipanin tillagað | Fáa allar funktiónir at virka sum ætlað, so vit fáa fulla nyttu úr skipanini | Mett verður at skipanin er ment 90-95%, soleiðis at umleið 5-10% eru eftir at fáa uppá pláss | Umleið 250 tkr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Setan av starvsfólki | Nýggja stovninum væntar starvsfólk, fyri at røkja tær uppgávur, sum eru álagdar stovninum | Finna fram til hvørji starvsfólk vit hava tørv á. Seta ein setanarbólk at taka sær av setanunum. Lýsa eftir fólki, og seta fólk í starv | Tørvurin er nýggju starvsfólk. Hesi eru øll byrjaði: Tvey í januar, eitt í februar, eitt í marts, eitt í apríl, tvey í juni, eitt í juli og eitt í august.<br>Umframt hesi hava vit eitt vaskifólk og til tíðir eisini eitt hjálparfólk | Lýsingar o.a. í smb. við starvssetanir uml. 80 tkr. Lønir annars uml. 330 tkr. pr. mðr |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>HR – menning<br><br>Heilsutrygd ynskir at vera eitt familjuvinarligt, jaligt og mennandi arbeiðspláss í samsvar við galdandi almennan starvsfólkapolitikk | Heilsutrygd raðfestir starvsfólkarøkt- og menning frammaliga | At øll starvsfólk eru til árliga menningar- og starvsfólkasamrøðu<br><br>Byrja at fyrieika arbeiði til at øll starvsfólk fáa egna starvsfólkhandbók | Skipa samrøðurnar í apríl 2011<br><br>Gera starvsfólkahand-bøkur lidnar í 2011 | 20.000 kr.<br><br>Útreiðsluneutralt |

| **Endamál** | Støða | Mál í 2010 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Roknskaparreglugerð<br>Gera roknskaparreglu-gerð fyri Heilsutrygd og fáa hana góðkenda av Heilsumálaráðnum | Roknskaparreglugerðin er gjørd, og er send Heilsumálaráðnum til góðkenningar.<br>Nakað av samskiftið hevur verið, og smærri broytingar eru gjørdar. Heilsutrygd hevur skriva undir. Reglugerðin liggur nú hjá HMR til undirskrivingar | At Heilsutrygd skal hava eina dagførda roknskaparreglugerð, sum greitt lýsir øll viðurskifti um roknskaparhald hjá Heilsutrygd.<br><br>At øll starvsfólk skulu til allar tíðir vera væl kunnað um innihaldi í roknskaparreglugerðini<br><br>At roknskaparreglugerð-in er dagførd | Roknskaparreglugerðin er undirskrivað, og send Heilsumálaráðnum til undirskrivingar.<br>Miðjað varð eftir, at hon bleiv góðkend seinast í 2010<br><br>Roknskaparreglugerðin verður løgd fram og gjøgnumgingin saman við starvsfólkunum í februar 2011<br><br>Reglugerðin verður dagførd samsvarandi broytingum á stovninum, umframt virkisøki og yvirskipaðu fyrisetingunum annars | Útreiðsluneutralt<br><br>Útreiðsluneutralt<br><br>Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Finna egnaði hølir til virksemi, fyrst fyribils hølir og síðan hølir til langtíðar nýtslu | Fult møblerað hølir blivu tøk um árskiftið hjá Nema. Hesi blivu leigað í fyrstu syftu.<br><br>Lýst varð eftir hølum til varandi loysn.<br>22 bjóðaðu hølir fram | Gera sáttmála um fyribilshølir.<br><br>Finna endaligu hølini, og gera sáttmála um leigu | Sáttmáli ikki gjørdur, tí hølini ikki lúka krøvini hjá Landsverk.<br><br>Uppskot til sáttmála sent Landsverk til góðkenningar. Eftir ætlan flyta í nýggju hølini í juni 2011 | Leiga 14.300 pr. mðr. + 2.000 fyri el og olju<br><br>Leigan verður uml. 26.000 pr. mðr + el og olju |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Skipan til tíðarskráseting v.m. skal útvegast | Hóast stovnurin er lítil, meta vit tað rætt, at hava skipan til tíðarskráseting. | Kanna hvat finst, og hvat er mest skinsamt at útvega.<br>Niðurstøðan er at TotalView er rætta loysnin | TotalView er bíløgd, og koyrir innan árslok 2010 | Uml. 60.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Upp-, afturlatingar- og tlf. tíðir | Heilsutrygd ynskir at veita borgarunum eina góða tænastu, og at hava opið meir enn flestu sjúkrakassarnir høvdu.<br><br>Eisini ynskir Heilsutrygd at hava telefontíð longri enn flestu sjúkrakassarnir høvdu | At gera av nær upp- og afturlatingartíðir skulu vera<br><br>At gera av nær telefontíðin skal vera | Avgjørt at hava opið mánadag – fríggjadag frá kl. 9 – 15<br><br>Avgjørt at hava telefontíð mánadag – fríggjadag frá kl. 9 – 15 | Útreiðsluneutralt |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Innkrevjing av HT gjaldi | TAKS krevur HT gjaldið inn vegna Heilsutrygd, og skipanin hevur virkað væl | Saman við TAKS áseta kostnaðin fyri hesa tænastu, umframt hvussu ivamál skulu loysast | Samskift við TAKS um støðd á samsýning o.a. | Kostnaður í 2010 uml. 2,2 mió.<br>Væntandi nakað lægri í 2011 |

| Endamál | Støða | Mál í 2010 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Stovnurin er nýggjur, og skal hava neyðugt innbúgv | Fyribilshølini vit eru í vóru møbleruð, tá vit fluttu inn | Keypa neyðugt innbúgv og neyðuga útgerð.<br><br>Okkum stóð í boðið at keypa brúktu møblarnar frá JFK og frá LBF.<br><br>Nýtt innbúgv mátti keypast<br><br>Telduútgerð o.tl. | Hugt hevur verið eftir møblum, og tilboð innheintaði.<br><br>Keypt møblarnar frá JFK og LBF.<br><br>Keypt stólar, hyllar, borð o.a. sum brúk er fyri.<br><br>Keypt teldur o.a. útgerð | Útreiðsluneutralt<br><br>120.000 kr.<br><br>Umleið 300.000 kr.<br><br>Umleið 300.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Telefonskipan | Til at hava eitt høgt tænastustøði er neyðugt at hava eina góða og vælvirkandi telefon skipan | Útvega nýggja telefonskipan, har øll starvsfólk hava eina borðtelefon og fartelefon til arbeiðsnýtslu | Fingið tilboð frá Føroya Tele og Vodafone. Keypt skipan við borðtelefo-num og fartelefonum til øll starvsfólk frá Føroya Tele | Umleið 25.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Markera at Heilsutrygd er farið í gongd sum nýggjur stovnur og at stjóri er settur | Skipað móttøku fyri at markera, at stovnurin er latin upp 01.01.10 og at stjórin er byrjaður í starvinum | Hava móttøku við pinnamati + drekka, røðum og tónleiki | Móttøkan hildin í niðastu hædd á Stangavegi 53, við teim ætlaðu tiltøkunum | Umleið 35.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Sum stovnur skal Heilsutrygd hava egið búmerkið | Nøkur uppskot vóru til hvør kundi gera búmerkið | Grafia v/Jastrid Gullaksen fekk til uppgávu at gera búmerkið | Búmerkið gjørt og avdúkað á móttøkuni | 20.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Heimasíða | Heilsutrygd skal hava egna heimasíðu. Heimasíðan skal vera upplýsandi og tað skal m.a. bera til útskriva oyðubløð | Velja veitara, snið, biðja um tilboð og fáa síðuna gjørda og lagda út | Sansir valdir til veitara. Síðan er næstan liðug, og verður væntandi løgd út í januar 2011 | Umleið 60.000 kr. |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>KT trygd | Mannagongdir og skipanir skulu gerast fyri at betra um KT trygdina | Seta hol á arbeiðið at hækka KT-trygdina og at gera mannagongdir | Hava havt fund við Gjaldstovuna og Landsnet, sum hava lovað at hjálpa okkum ávegis | Útreiðsluneutralt í 2010 |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Endurnýggja sáttmálar við fakfeløg og samráðast um nýggjar sáttmálar við fakfeløg | Heilsutrygd hevur yvirtikið teir sáttmálar við fakfeløg, sum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya hevði. Harafturat skulu sáttmálar gerast við fakfeløg, har ongin sáttmáli var áður | Fáa gongd á samráðingar við nøkur av fakfeløgunum.<br><br>Samráðingarnar ganga umvegis Samráðingar-nevndina, har Heilsutrygd hevur umboð | Samráðingar eru byrjaðar við nøkur av fakfeløgunum | Kenna ikki kostnaðin |
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Oyðubløð | Av tí at stovnurin veitir ískoyti/stuðul í nógvum førum smb. umsókn, skal stovnurin hava ymisk oyðubløð | Gera oyðubløð til allar tær mest týðandi avgreiðslurnar | Oyðubløðini eru gjørd, og vera løgd á heimasíðun hjá Heilsutrygd | Útreiðsluneutralt |

| **Endamál** | Støða | Mál í 2010 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingarlig viðurskifti:<br><br>Kommunulæknar senda rokningar úr Cosmic | Í dag senda flestu kommunulæknar manuellar rokningar, har teir leggja við tær smáu rokningarnar, har kundin hevur skrivað undir | Byrja at fyrireika Cosmic og kommunulæknarnar at brúka samlirokning úr Cosmic | Nakrir læknar eru byrjaðir at brúka skipanina, men har eru trupuleikar við Cosmic, sum mugu loysast fyrst. Síðan mugu kommunulæknarnir hava neyva upplæring | Útreiðsluneutralt í 2010 |
| Kjarnuøki 1:<br><br>Yvirtaka virksemið hjá gomlu sjúkrakøssunum og fáa tað at koyra | Vit brúka Navision til at umsita kommunulækna-skipanina við, og Búskaparskipan Landsins til bókhald og stýring | Vóru afturút frá ársbyrjan, men eru nú komin rættuliga væl ajour. Avgreiðslutíðin av rokningum er í dag bert nakrar fáa dagar | Fingið fleiri veitarar at senda rokningar sum e-rokningar.<br>Arbeitt miðvíst við at fáa skrásett útreiðsluna í røttum mánaða. Komið væl ávegis | Útreiðsluneutralt |
| Kjarnuøki 2:<br><br>Yvirtaka partar av Hjálparráðum frá Almannastovuni, og fáa avgreiðsluna at koyra | Brúka Búskaparskipan Landsins og FIGS skipan at avgreiða við.<br><br>Brúka Info Organizer til journalisering | Fáa eina avgreiðslu-skipan at koyra, har bíðitíðin ikki er ov long.<br><br>Tillagað Info Organizer til okkara nýtslu | Gjørt avtalu um samstarv við Almanna-stovuna um útflýggjan av skjølum og upplýsingum.<br><br>Tillagingar lidnar í desember | Útreiðsluneutralt<br><br>Uml. 20.000 kr. (er við undir punktinum: velja og útvega Journalskipan) |
| Kjarnuøki 2:<br><br>Afturvendandi fundir um avgreiðslu av hjálparráðum | Heilsutrygd yvirtók 01.04.2010 avgreiðslu av ymsum hjálparráðum frá Almannastovuni. Hervið fylgdu eisini nøkur ivamál | HT og HMR mettu rætt vera, at hava vikuligar fundir serliga í byrjanini, til avgreiðslu av málum har ivi kundi vera um viðgerðina/avgerðina | Vikuligir fundir vóru hildnir í april, mai og juni, tá mett varð, at hetta ikki var neyðugt meir | Umleið 4.000 kr. í koyripeningi |
| Kjarnuøki 2:<br><br>Avtala um ríðufysioterapi | Síðan 01.08.2010 hevur ongin skipan verið fyri fjølbrekað børn, sum áður hava fingið stuðul til ríðifysioterapi | Gera nýggjan sáttmála | Bólkur mannaður við Fróða Jacobsen HMR, og Jan Danielsen og Petur Martin Hansen frá HT hava arbeitt við nýggjum sáttmála.<br>Um at verða liðugt við ársskiftið | Útreiðsluneutralt í 2010. |
| Umboðan uttanhýsis:<br><br>Umboð í Samstarvsnevndina | Samstarvsnevndin er nevnd mannað við trimum umboðum frá KLF, einum frá HMR, einum frá HT umframt einum afturat. Landsstýrismaðurin setir limirnar í nevndina | Velja lim í nevndina | Jan Danielsen valdur at umboða Heilsutrygd | Uml. 3.000 kr. árliga til koyripengar |
| Umboðan uttanhýsis:<br><br>Umboð í BE-skipanina | BE-skipanin er skipan mannað við einum umboði úr HMR, einum frá HT og tveimum úr KLF | Velja lim í nevndina | Jan Danielsen valdur at umboðað Heilsutrygd | Útreiðsluneutralt í 2010 |

| **Endamál** | Støða | Mál í 2010 | Tiltøk/Avrik | Mettur kostnaður |
|---|---|---|---|---|
| Umboðan uttanhýsis:<br><br>Umboð í Dygdargrunnin | Dygdargrunnurin er grunnur mannaður við einum umboði úr HMR, einum úr HT og tveimum úr KLF | Velja lim í grunnin | Jan Danielsen valdur at umboðið Heilsutrygd | Útreiðsluneutralt í 2010 |
| Umboðan uttanhýsis:<br><br>Stýrið fyri hvíldarheimið Naina | MFS hevur í mong ár havt umboðan í stýrinum fyri Nainu. Nú skal Heilsutrygd hava umboðan í stýrið | Velja lim í stýrið | Jan Danielsen valdur til lim í stýrinum fyri hvíldarheimið Naina | Útreiðsluneutralt |
| Umboðan uttanhýsis:<br><br>Umboð í Samráðingarnevndina | Tá sáttmálar skulu við-gerðast við fakfeløg, er tað Samráðingarnevndin sum er okkara partur í samráðingunum | Velja umboð í Samráðingarnevndina | Petur Martin Hansen valdur í Samráðingarnevndina | Umleið 5.000 kr. í koyripeningi |

Tórshavn, hin 1. apríl 2011

**Heilsutrygd**

Jan Danielsen, stjóri

**Heilsumálaráðið**

Poul Geert Hansen, aðalstjóri